# TILTØK

**Gudstænastur**
**23. sunnudag e. Trinitatis**
***Vesturkirkjan:*** kl. 11.00, Heri Joensen
***Havnar kirkja:*** kl. 11.00, Bjarni Bæk. ***Kl. 14.00*** Grønlendsk gudstænasta v/ Jens-Kristian Kleist
***Kvívík:*** kl. 12.00, altargongd - Inga Poulsen Dam
***Vestmanna:*** kl. 12.00, Mogens Tilsted Christensen
***Sandavágur:*** kl. 11.00, altarg., David Johannesen
***Eiði:*** kl. 11.40 Skriftamál, kl. 12.00 Messa, Emil Olsen
***Oyndarfjørður:*** kl. 12.00, altarg., Jógvan Fríðriksson
***Elduvík:*** kl. 12.00, Uni Næs
***Selatrað:*** kl. 17.00 altarg., Jógvan Fríðriksson
***Glyvra kirkja:*** kl. 11.00, Deyvagudstænasta, Jónsvein Bech. Talvan gongur fyri deyvameinigheitina
***Kl. 20.00*** Sangkvøld v/ Kór Glyvra kirkju.
***Fríðrikskirkjan:*** kl. 11.00, Meinhard Bjartalíð
***Christianskirkjan:*** kl. 11.00,
***Árnafirði:*** kl. 12.15,
***Norðoya Røktarheim:*** kl. 14.30 Hans Eiler Hammer.
***Klaksvíkar Sjúkrahús:*** kl. 10.00,
***Kunoy:*** kl. 12,00, altarg., Niels Pauli Danielsen
***Vágur:*** kl. 11.00, altarg.,
***Hov:*** kl. 13.00, altarg.,
***Eldrabýlið í Vági:*** kl. 14.00, Patrick de Neergaard
***Sandvík:*** kl. 18.00 Ólavur Rasmussen

**Allahalgana dag**
***Havnar kirkja:*** kl. 20.00 Bergur Debes Joensen
***Minningarhald teirra sjólatnu verður við minnisvarðan í Miðvági***
Allahalgana dag kl. 15.00. David Johannesen, sóknarprestur talar. Sálmabókin verður nýtt. Um ikki viðrar, verður minnigarhaldið í kirkjuni.

**Meinigheitshúsið í Havn**
Leygardagin 9.30 - 12.00 Foreldur og børn hittast.
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli - seinasta freist at lata eskjurnar inn til tiltakið »Christman Child«.
Sunnudagin kl. 18.00 Møti v/Ejvind Mouritsen, Meinigheitskórið syngur.
Mánakvøldið kl. 20.00 Kvinnumøti.
Mánakvøldið kl. 20.00 Un-g-dómsmøti fyri 18 ár og eldri, »Menniskja í nútíðarsamfelagnum« v/Hjalmar Hansen.

**Losjan í Havn**
Leygarkvøldið kl. 20 opið hús við nógvum sangi og vitnisburði. Julius, Luddi, Herman og Gigga syngja.
Sunnukvøldið kl. 18 evangeliskt møti. Talarar David Bech og Palli Højgaard. Tórmund og fleiri luttaka.
Drekkamuður aftaná møtini.

**Samkoman við Marknagil**
*Skúlaheimið, Marknagilsv.75*
Møti: Sunnumorgunin kl. 10.30 Breyðbróting.
Barnaansing verður eisini.
Sunnukvøldið kl. 18.00 Evangeliskt møti
Mánakvøldið kl 20.00 Bønar/uppbyggingarmøti.

**Adventkirkjan**
Leygardagin kl. 10.00 bibliugransking og barnabíbliutími. Kl 11 gudstænasta, J.V. Danielsen.

**Missiónshúsið v/ Landavegin**
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli í býlingshúsinum á Norðasta Horni, sunnukvøldið kl. 18.00 Møti í Missiónshúsinum v/ Martin Thomsen.

**Katólska kirkjan**
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 Orðsins tænasta v/ kommunión í Kerit.
Leygardag kl. 11.30 Orðsins tænasta v/ kommunión í Kerit.
Sunnudag kl. 11.00 Orðsins tænasta v/ kommunión í Mariukirkjuni. Talvan gongur fyri Missiónsarbeiði (Verdensmission). Sunnudagsskúli kl. 14.00.
Síðsta sunnudag í hvørjum mánaði verður tilbiðjan av tí heilaga Sakramentinum í Mariukirkjuni frá kl. 15.00 til 18.00. Serliga vilja vit biðja fyri okkara meinigheit og tí henni tørvar. Øll eru vælkomin. www.katolsk.fo

**Lívdin**
*í Hoyvíkar skúla*
Leygarkvøldið kl. 20.30 ungdómsmøti.
Sunnumorgunin kl. 10.30 á familjumøtinum luttaka Ása og Ólavur Jøkladal.
Kl.11.30 samvera við drekka.
Á tilbiðjanarmøtinum kl. 12 heldur Jógvan Z. fram við røðini »Sannleikar úr Rómbrævinum«.
Barnaansing er undir møtinum.
Sunnudagsskúlin kl. 12.
Møti kann hoyrast á netinum www.livdin.fo
Týskvøldi samlast húsbólkarnir.

**Frá Ebenezer**
Fríggjadag kl. 7.00 Bønarmøti fyri samfelagsmøtinum, kl. 17.00 Bønarmøti fyri samfelagsmøtinum.
Leygardag kl. 7.00 Bønarmøti fyri samfelagsmøtinum, kl. 17.00 Bønarmøti fyri samfelagsmøtinum.
Sunnudag kl. 10.00 Breyðbróting, kl. 12.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Evangel. møti. www.ebenezer.fo

**Evangeliihúsið, Tróndargøta**
Sunnudagin kl. 11.00 Familju- og morgunmøti við sunnudagsskúli, Dánial á Dul Jacobsen talar, kl. 18.00 Møti við Mirjam og Victor Carlsen www.gospel.fo

**Hebron, Argir**
Sunnudagin kl. 10.30 Morgunmøti og samstundis barnaansing, kl. 11.30 Samvera við drekkamunni,
kl. 12.00 Sunnudagsskúli,
kl. 12.00 Møti, Jonna og Hans Sivertsen, trúboðarar í Nuuk, luttaka á møtinum.
Mánadagin kl. 19.00 Ungdómstiltakið BeTwix fyri tey sum ganga í 5.-8. flokki.
Verið hjartaliga vælkomin. www.hebron.fo

**Fríkirkjan Oasan**
*Kirkjustræti 4*
Leygarkvøldið kl. 21.00 Unplugged – café kvøld.
Sunnudagin kl. 14.00 Familjugudstænasta – barnakórið syngur.
Mánadagin kl. 16.15 til 17.00 venur barnakórið, 1. flokkur og eldri. Verið hjartaliga vælkomin. www.oasan.fo

**Frelsunarherurin, Tórshavn**
Sunnudag kl. 11.00 Møti. Eingin sunnudagsskúli, men Familjutími kl. 17.00. Øll eru vælkomin, drekka eftir møti. www.frelsunarherurin.fo

**Filadelfia, Landavegur 22**
Í dag kl. 6.00 Morgunbøn, kl. 20.00 Ungdómsmøti – Ólavur Guttesen talar.
Í morgin kl. 17.00 Landsbøn.
Sunnudagin kl. 11.00 Morgunmøti v/ Tummas Jacobsen, kl. 11.50 Sunnudagsskúlin. www.filadelfia.fo

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11.00 Morgunmøti, kl. 18.00: Evangeliskt møti. Øll eru vælkomin.

**Kollafjarðar missiónshús**
Sunnudagin kl. 14.30 sunnudagsskúli, kl. 18.00 møti við Teodor Petersen.

**Saron, Vestmanna**
Sunnudagin kl. 11.00 Morgunmøti við breyðbróting. Verið hjartaliga vælkomin.

**Filadelfia, Miðvágur**
Sunnudagin kl. 11.00 familju- og morgunmøti við sunnudagsskúla, Lona Johansen talar.
Mikukvøldið kl. 20.00 undirvísing og bøn.

**Miðvágs Missiónshús**
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli. Samstundis seinasta freist at lata skógvaeskjur inn. Drekka aftaná. Kl. 18.00 Møti v/ Tom Skaale, missiónsskrivara. Evni: Útimissión. Hjartaliga vælkomin.

**Lívsins Orð, Saltangará**
Sunnudagin kl. 10.30 Møti v/ Símun Jacobsen, kl. 11.00 Sunnudagsskúli.

**Keldan, Skálafjørður**
Leygardagin kl. 17.00 Listaframsýning og sangløta, kl. 21.00 Gospelkonsert, kostnaður 30 kr.
Sunnudagin kl. 17.00 Møti við Paula Høj, sangur við Lisu og lovsangskórinum.
Barnamøti kl. 17.00.
Vælkomin í Kelduna. www.keldan.fo

**Aglow – Eysturoy**
Møti verður í gomlu Keldu, í Skálabotni, fríggjadagin 28. okt. kl. 20.00. Allar kvinnur eru hjartaliga vælkomnar.

**Tjørnuvík**
Sunnukvøldið kl. 18.00 verður sang- og vitnimøti í Bygdarhúsinum við Snorra Brend og øðrum úr Meinigheitshúsinum í Havn. Øll eru vælkomin.

**Skúlin í Funningi**
Fríggjakvøldið kl. 20.00 talar Knút Larsen, Menn av Strondum syngja.
Leygardagin kl. 20.00 talar Niels Jacob Nielsen, Sangkreftir úr Klaksvík.
Sunnudagin kl. 15.00 Sunnudagsskúli v/ Marjon Poulsen, kl. 18.00 talar Regin Høgnesen, Leila Højgaard syngur. Innsavnan til Heimamissiónina. Bønarmøti verður hvørt kvøld hálvan tíma áðrenn møti.

**Hvalvíkar missiónshús**
Sunnudagin kl. 14.30 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Møti við Símun Joensen og Glyvrakórinum.
Mikukvøldið kl. 20.00 Bíbliutími. Matt.evang. kap. 4. Øll eru vælkomin.

**Kirkjukjallarin, Gøta**
Ungdómsmøti verður leygarkvøldið kl. 20.00 v/ Marius Jacobsen. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið í Leirvík**
Sunnudagin verður familjumøti kl. 17.00 og ungdómsmøti kl. 21.00 við heimligum kreftum. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Getsemane, Klaksvík**
Fríggjakvøldið kl. 20.30 Ungdómsmøti við Eivinn Bringsberg og Dávid Mørkøre.
Leygardagin kl. 10.00 Bøn og kl. 21.00 Ungdómsróp.
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli og kl. 18.00 Møti við André Matras.
Mánadag til fríggjadag kl. 6.15 Morgunbøn. Tú ert hjartaliga vælkomin.

**KFUM og KFUK, Klaksvík**
Fríggjakvøldið kl. 22.00 Opið hús.
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Konfirmantveitsla, kl. 21.00 Ungdómsmøti, Albin Johannesen talar. Øll eru vælkomin.
Mánakvøldið kl. 20.00 kemur sjómanskvinnuringurin saman at pakka jólapakkar. Allar kvinnur vælkomnar www.kuff.fo

**Soli Deo Gloria**
Sunnudag kl 14.00 sunnudagsskúli, sunnukvøldið kl 18.00 møti v/Palla Petersen og Olvheðin Jacobsen
Mánakvøld kl 20.00 bønarmøti.

**Missiónshúsið á Viðareiði**
Leygarkvøldið kl. 20.00 verður ungdómsmøti við luttøku úr KFUM og K. Øll eru vælkomin.

**Missiónshúsið á Tvøroyri**
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bønarmøti og kl. 18.00 Møti við Jósvein Hovgaard úr Porkeri.

**Salem, Tvøroyri**
Ungdómsløta fyri 12 ár og eldri verður í kvøld kl. 20. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Sion, Vágur**
Sunnudagin kl. 11.00 Morgunmøti, kl. 18.00 Evangel. fundur – luttøka úr Filadelfia í Havn.
Mánadagin kl. 20.00 Bøn.

**Frelsunarherurin, Vágur**
Leygardagin kl. 20.00 Aglow møti.
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Evangel. møti, Karina Magnussen talar. Øll eru vælkomin.
Mánadagin kl. 20.00 Guitarskúli, 12 ár og eldri.
Týsdagin kl. 18.00 Juniorklubbur, kl. 20.00 Streingjakórið øvar.
Onsdagin kl. 18.00 Juniormøti, kl. 20.00 Heimaforbundsmøti.

**Missiónshúsið í Hvalba**
Sunnukvøldið kl. 18.00 Møti v/ Kristein og Noru Stórhamar.

**Aglow, Suðuroy**
Møti verður í Frelsunarherinum í Vági leygarkvøldið kl. 20.00. Allar kvinnur eru hjartaliga vælkomnar.

**Missiónshúsið í Skopun**
Fríggjakvøldið kl. 19.00 Møti v/ Sigfred Johannesen og Gullak Johannesen, Jónhilda og Gullak syngja.
Leygarkvøldið kl. 19.00 Møti v/ Streingjakórinum úr Vágunum. Innsavnan til barnaarbeiðið.
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti v/ Hans Paula Højgaard og Sigfred Johannesen, Jónhilda og Gullak syngja. Bøn- og lovsangsløta 1/2 tíma áðrenn møtini. Innsavnan til húsið. Hjartaliga vælkomin.

**Sands Missiónshús**
Sunnudagsskúlin verður kl. 14.30, kl. 18.00 Møti, Heðin Jacobsen innleiðir. Sangkreftir luttaka.

**»Keldan« í Skálavík**
Undir heitinum »Jesus – tín einasta vón« talar Svenning av Lofti á møtunum, sum byrja hóskvøldið kl. 19.30 og halda fram til sunnukvøldið.
Sangur: Eddie Bech og onnur úr Suðuroynni, við harmoniku. Lovsangsbólkur úr Skopun, Maria Andersen úr Havn við guittara. Erla Jensen og onnur ung úr Havn.

**Ørkin, Reykjavík**
2.-7. nov. fær Örkin vitjan av Jógvani Fríðrikssyni, presti o.ø. Í hesum sambandi verður møti, hugnakvøld og gudstænasta.
Møti hvørt sunnukvøld kl. 20.30. Aftaná er kaffi. Øll eru hjartaliga vælkomin. www.hotel-orkin.com

**Hugnakvøld – Vágs Pensionistafelag**
Felagið fyri pensionistar í suðuroy – sunnaru helvt, **hevur 20 ára stovningardag í ár. Í hesum sambandi verður hugnakvøld 31. oktober 2005 kl. 19.00** í Stóra Pakkhúsi í Vági.


**ENDURLÝSING**

## Netfyrisitari í Fíggjarmálaráðnum



**Starv sum netfyrisitari á gjaldstovuni er leyst at søkja**

Nú netfyrisitarin fer í annað starv á gjaldstovuni, so er starvið sum netfyrisitari leyst at søkja.
Netumsitingin veitir tænastur til stovnar í Fíggjarmálaráðnum, t.v.s. sjálvt ráðið, Føroya Gjaldstovu, Toll- og Skattstovu Føroya og Hagstovu Føroya.

Tann, ið settur verður, skal
- hava viðkomandi útbúgving og ella drúgvar royndir á økinum
- hava góð samstarvsevni
- megna at arbeiða sjálvstøðugt
- ikki vera bangin fyri at hugsa nýggjar loysnir
- tora at taka avgerðir.

Starvið er lønt sambært sáttmála millum landstýrið og viðkomandi yrkisfelag.

Umsóknir skulu vera Føroya Gjaldstovu, boks 2009, 165 Argir, í hendi í seinasta lagi mánadagin 7. november 2005

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Hilmar Augustinussen, fartlf. nr. 21 2261 sum er fúsur at svara spurningum.

Um starvið:
Tann ið settur verður skal, saman við netumsitaranum hava ábyrgdina av og umsita hesar skipanir og øki:
- postskipanini (MSExchange)
- proxi- og medi-, fílu-, MS-SNA -, navna - og WEB-ambætarum.
- brúkara- og atgongdarstýring
- brandmúri (Firewall)
- miðsavnaðum og miðfirraðum antivirus
- lan/wan við switchum
- backup
- dagføringum og viðlíkahaldi av skipanunum og forskriftum
- búsjett fyri netumsitingina
- samskifti við veitarar
- EDV – trygd sum heild

*Um netfyrisitingina:*
*Netfyrisitingin er skipað undir gjaldstovnuni. Omanfyri netfyristingina er eitt netráð. Í netfyrisitigini arbeiða umframt leiðaran ein persónur. Harafturat er eitt stavsfólk, sum í dagligdegnum starvast í tolli og skatti, knýtt til netfyrisitingina.*

Heimasíða: **www.gjaldstovan.fo**